**Fundur í Mentanarnevnd Løgtingsins 26. apríl 2023.**

LM-087/2022 - Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkakirkjuna í Føroyum (Heimild at býta upp embætisuppgávur millum próstar)

**Próstar og umsiting fólkakirkjunnar.**

Nú málið um nýggjan prást hevur verið í miðlunum, verður ein stutt frágreiðing givin.

Verandi dómprósturin er knýttur at dómkirkjuni. Afturat embætinum sum sóknarprestur í Havnar kirkju og Nólsoyar kirkju hevur hann fíggjarligu stýringina av øllum kirkjunum í landinum um hendi. Uppgávuna við atliti at fíggjarstýringini fremur hann saman við Próstadømisráðnum.

Somuleiðis hevur dómpróstur allar starvsfólkauppgávurnar sum eru tengdar at teimum 30 prestunum sum starvast í fólkakirkjuni. Harumframt hevur hann *eftirlit* við grundskrásetingini hjá landinum, sum 17 kirkjubókaførandi sóknarprestar fremja fyri landið.

Tað er eftirlitsuppgávan við kirkjubókunum og starvsfólkauppgávurnar, sum ein komandi próstur ætlandi skal yvirtaka.

Komandi prósturin verður ein av sóknarprestunum í embæti og varðveitir sítt embæti. Tær fyrisitingarligu uppgávurnar verða 25% av embætinum.

**Fólkakirkjan og framtíðin**
Seinasta árini hevur fólkakirkjan verið í eini sera jaligari tilgongd. Kirkjan hevur sett á skrá nøkur strategisk mál fram til 2030. Strategisku málini skulu tryggja, at fólkakirkjan flytur seg við tíðini og er í javnvág við samtíðina.

Eitt nú er ætlanin at fáa fleiri prestar út í samfelagið millum borgarar landsins. Eitt strategisk mál er at seta ein studentaprest at virka á miðnámsskúlunum kring landið. Eitt annað er diakonpresturin, ið kemur at virka úti á gøtuni, millum teirra sum hava sosialar avbjóðingar. Arbeiðið er væl áleiðis og størvini verða væntandi lýst leys í summar.

Fólkakirkjan hevur havt sjúkrahús- og fongsulsprest í nógv ár. Tey seinastu 3 árini hevur ein integratiónsprestur verið í tíðaravmarkaðum starvi, sum hevur starvast við sera týðandi uppgávum millum tilflytarar.

Fyri stuttum var eisini formlig avtala gjørd um sálarhirða til føroyingar, sum eru í varðhaldi ella sita longri dóm í donskum fongslum.

Endamálið við størvunum er, at fólkakirkjan skal røkka borgarunum úti í samfelagnum, samstundis

sum bjóðað verður til gudstænastu í kirkjunum kring landið hvørja viku.

At førleikamenna kirkjuráðini, at styrkja kristni í skúlunum og útvega fleiri sjálvboðin eru onnur strategisk mál, sum fólkakirkjan ynskir at arbeiða við framyvir.

Hesi málini eru eisini uppgávur, sum ein komandi próstur ætlandi skal arbeiða við, soleiðis at dómprósturin fær meiri tíð til uppgávurnar tengdar at dómkirkjuni – sínum sóknarprestaembæti – og fíggjarstýringini av teimum 61 kirkjunum í landinum.

**Umsitingin hjá fólkakirkjuni**
Síðani fólkakirkjan var yvirtikin í 2007, hevur kirkjuskatturin verið hin sami, t.e. 0,6%. Í ávísum kirkjusóknum hevur harafturat verðið staðbundin kirkjuskattur, tá ið ein kirkja hevur havt verkætlanir og dagføringar á skránni.

Umsitingin hjá fólkakirkjuni telur 4 fyrisitingarlig fólk útyvir dómpróst og biskup. Hetta er 1,5 starv *undir* normering. Tí kann ikki sigast, at umsitingin hjá fólkakirkjuni bólnar, hóast ein próstur afturat verður settur við einum minni brøki til samskipan av prestatænastuni.

Fólkatalið í landinum er munandi vaksið síðani 2007. Talið av prestum er økt samsvarandi.

Fólkakirkjan er í eini jaligar menning, og skulu vit varðveita positivu gongdina, er týðandi at vit framhaldandi fylgja við, gera ábøtur og hugsa nýtt.

**Kirkjugrunnurin – rakstur og fígging**
Lutfallið millum stuðulin frá Landskassanum og fólkakirkjunnar egnu fígging eru skeiklað síðani yvirtøkuna av málsøkinum fólkakirkjan.

Í 2008 var stuðulin frá Landinum 21% av samlaða rakstrinum av fólkakirkjuni = ið var 45 mió. kr.

Í 2022 var stuðulin frá Landinum 12% av samlaða rakstrinum av fólkakirkjuni = ið var 79,5 mió. kr.

Biskupur metir, at Próstadømisráðið, Føroya Stiftsstjórn og umsitingin hava gjørt eitt megnar arbeiði við atliti at fíggjarstýring kirkjunnar.

Harafturat eru bygningar fólkakirkjunnar – kirkjur og prestagarðar – álvarsliga dagførdir, hóast vit als ikki eru komin á mál, tí dagføringar og viðlíkahald eru leypandi útreiðslur.

Sí hjálagda skjal um rakstur og fígging av Kirkjugrunnini 2007-2022, ið fíggjarleiðarin hevur gjørt.

**Tøkk**
Biskupur takkar vegna fólkakirkjuna Føroya Løgtingið, Landsstýrinum og Mentamálaráðnum fyri gott samstarv hesi seinastu 15 árinum.

Hugaligt at myndugleikar landsins geva kirkjuni gætur, ið er ein berandi bulur í mentanararvi føroyinga.